


QUALITY INNOVATION RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir laks og liðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES. Tað starvast umleið 200 fólk í samtakinum.

# Linjueftirlit

Søkt verður eftir einum linjueftirliti til okkara dagligu portiónsframleiðslu á Bakkafrost. Starvið er fulltíðarstarv í skiftisvaktum.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini fyritøku við støðugari menning.

Starvið fevnir um dagligt eftirlit við vøru og framleiðslu, og tú kemur at arbeiða í einum toymi undir okkara BRC/IFS góðskustýringarskipan.

Vit ynskja av tær, at tú ert sera álítandi og røkin. Ert fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Hevur góð samstarvsevnir og kunnleika til enskt og vanlig telduforirit. Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving ella royndir innan matvøruframleiðslu.

Løn sambært avtalu.

Umsóknarfreistin er 12. juni 2009. Miðað verður eftir at seta starvið skjótast gjørligt. Umsóknir saman við prógvum, CV og øðrum verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

P/F Faroe Salmon Processing
Bakkavegur
FO 625 Glyvrar
Att. Kári Jacobsen
kari@bakkafrost.com

Bakkavegur 8
FO-625 Glyvrar
Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com
www.bakkafrost.com

BAKKA FROST

## Útbering av dagbløðum og reklamum



**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í **Vági.**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 55 14 00** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: **utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 55 14 00 · Útbering tel 55 14 05 · Fax 55 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo



DAGSTOVNURIN REIÐRIÐ
SØKIR NÁMSFRØÐINGAR
& SJÚKRARØKTARFRØÐING

Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum og einum sjúkrarøktarfrøðingi til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi.

Størvini verða sett við einum vikuligum tímatali uppá 25 tímar og eru at byrja skjótast gjørligt.

Vit ynskja at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevnir og kanst arbeiða sjálsvstøðugt við at loysa uppgávurnar, í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 23 65 21.

Setanartreytir eru eftir avvarðandi fakfelag.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 23. juni 2009, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovan,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn og ung við fjølbreki undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosialari samveru og fáa eitt mennandi tilboð, saman við neyðugu venjingunum. Á stovninum eru 8 børn og ung. Reiðrið er ein partur av Stuðulsfólkaskipanini fyri børn, sum er ein skipan undir Almannastovuni, ið veitir stuðul til heimabúgvandi børn, ið bera brek.

KREA · TEL 60 80 80